**Mentamálaráðið**
*Fólkaskúladeildin*

**Niðanfyri nevndu størv í Vestmanna skúla eru leyst at søkja frá 1. august 2005**

# Skúlastjóri

## í Vestmanna skúla

# Varaskúlastjóri

## í Vestmanna skúla

Størvini eru lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag og verða sett sum sáttmálasett størv, uttan so, at tann sum sett/-ur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

Víst verður annars til nærri lýsing av størvunum á heimasíðuni hjá Mentamálaráðnum www.mmr.fo

Umsóknirnar skulu verða Mentamálaráðnum í hendi í seinasta lagi mikudagin 30. mars 2005. Umsóknarblað liggur á heimasíðuni hjá Mentamálaráðnum.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar um størvini, kanst tú ringja til Jenny Lydersen, undirvísingarleiðara, ella Olaus Jespersen, deildarstjóra.

Tórshavn, 4. mars 2005
**Mentamálaráðið**
Hoyvíksvegur 72 · Postrúm 3279 · 100 Tórshavn
tlf. 35 50 50 · fax 35 50 50 · t-postur: mmr@mmr.fo

**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Læknaskrivari

Á Medisinska deplinum er eitt starv sum læknaskrivari fulla tíð leyst at søkja fyri læknaskrivara í farloyvi, til setan 1. mai 2005 til 31. oktober 2005 ella eftir avtalu.

Førleikakrøv:
- útbúgving sum læknaskrivari
- dugir at raðfesta arbeiðið, sum til tíðir er krevjandi
- góð samstarvsevni
- góður røkjuskapur
- teldukunnleiki

Løn- og setanartreytir sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Sæunn Ólavsdóttir Hansen, leiðsluskrivara, telefon 304500, lokal 6103.

Umsóknarfreistin er 14. apríl 2005 kl. 12.00.

Skivlig umsókn merkt "umsókn til starv" við CV, avrit av prógvum, viðmælum e.l. skal sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Lønar- og starvsfólkadeildin
FO 100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna »starvsfólk«*

**Mentamálaráðið**
*Fólkaskúladeildin*

# Fyrstalærarastarv í Haldórsvíkar skúla

Starvið sum fyrstilærari íHaldórsvíkar skúla verður lýst leyst til setanar frá 1. august 2005.

Starvið er lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag og verður sett sum sáttmálasett starv, uttan so, at tann sum sett/-ur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

Víst verður annars til nærri lýsing av starvinum á heimasíðuni hjá Mentamálaráðnum www.mmr.fo

Umsóknirnar skulu verða Mentamálaráðnum í hendi í seinasta lagi mikudagin 30. mars 2005. Umsóknarblað liggur á heimasíðuni hjá Mentamálaráðnum.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar um starvið, kanst tú ringja til Jenny Lydersen, undirvísingarleiðara, ella Olaus Jespersen, deildarstjóra.

Tórshavn, 4. mars 2005
**Mentamálaráðið**
Hoyvíksvegur 72 · Postrúm 3279 · 100 Tórshavn
tlf. 35 50 50 · fax 35 50 50 · t-postur: mmr@mmr.fo

Lesið Sosialin – so eru tit við

# Útbjóðing

Í samband við bygging av nýggjum barnaansingarstovni í Sørvági verður:

**Timbur- og snikkaraarbeiðið**

hervið boðið út í almenna lisitatión.

Bygningurin hevur eina grundvídd á uml. 680 $m^2$, umframt loft á uml. 360 $m^2$ og kjallara á uml. 72 $m^2$, ella samanlagt uml. 1.112 $m^2$.

Arbeiðið snýr seg í høvuðsheitum um allar veitingar í samband við liðuggerð av timbur- og snikkaraarbeiðinum.

Útbjóðingartilfarið fæst frá kommunuskrivstovuni í Sørvági frá týsdegnum hin 8. mars 2005 kl. 13.00, móti at flyta kr. 5.000,- á konto í Føroya Banka nr. 6460-207.582.4 ella Føroya Sparikassa nr. 9181-188.001.4

Tilboð í afturlatnum brævbjálva merktur »Barnaansingarstovnur í Sørvági: Timbur- og snikkaraarbeiði«, skulu vera Kommunuskrivstovuni í Sørvági í hendi seinast hin 6. apríl 2005 kl 15.00.

Lisitatiónin verður sama dag kl. 15.15, har teir bjóðandi hava møguleika fyri at verða hjástaddir.

**Sørvágs kommuna**
Tlf. 332004 - Fax 332952
t-postur: sorvag@sorvag.fo

# Ørindadrongur/-genta

Á Dómaraskrivstovuni er eitt starv sum ørindadrongur/- genta leyst at søkja til setan skjótst gjørligt.

**Vit vænta:**
At tú er fyrikomandi og hevur góð samstarvsevni

**Løn og setanarviðurskifti:**
- Starvið er tímalønt og verður roknað við 400 tímum árliga
- Løn og setanarviðurskifti sambært sáttmála millum Statsansattes kartel og Finansministeriet og sáttmála millum HK/STAT og Finansministeriet. Lønin er í løtuni 44,96 um tíman fyri 16 ára gomul.

Starvið fevnir um vanlig ørindi so sum banka- og postavgreiðslu og at koyra flaggið upp/niður halgidagar, og niður aftaná vanliga arbeiðstíð.

Umsókn og møgulig viðmæli verða at senda Dómaraskrivstovuni í seinasta lagi 14. mars 2005 kl. 12.00.

**Sorinskrivarin (Dómarin) í Føroyum,**
tann 1. mars 2005

**Suðuroyar Sjúkrahús**
**800 Tvøroyri**

# Portørur

Søkt verður eftir einum sjúkrahúsarbeiðara (portøri) til setan frá 15. apríl 2005.

Umframt vanligt portørarbeiði og koyring við sjúkrabili, umfatar starvið eisini alt fyrifallandi inni- og útiarbeiði. Talan er um fulltíðarstarv við tilkallivakt frá heiminum.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til leiðaran á Lønardeildini, Bergur Stórhamar tlf. 371133 lokal 140.

Løn- og setanartreytir sambært sáttmála millum Havnar Arbeiðsmannafelag og Fíggjarmálaráðið.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum v.m. verða at senda til:

**Suðuroyar sjúkrahús**
Umsjónarmaðurin
Postboks 51
800 Tvøroyri

**Umsóknarfreistin er 21. mars 2005.**